## VEÐRIÐ



Petur Skeel Jacobsen, veðurfrøðingur greiðir frá um veðrið




**Veðrið í dag:**
Andøvsgul upp í ein strúk av landnyrðingi og ælingur, men eisini sólglottar. Hitin millum 6 og 9 stig, leygarnáttina niður í 3 stig.




**Veðrið leygardagin:**
Gul til stívt andøvsgul av landnyrðingi og sólglottar, men eisini okkurt ælið, partvís vátaslettingur. Hitin millum 3 og 6 stig.




**Veðrið sunnudagin:**
Gul til stívt andøvsgul av eystri og yvirhøvur turt og sólglottar. Hitin millum 3 og 6 stig.

**Veðrið mánadagin og týsdagin:**
Stívt andøvsgul upp í hvassan vind av landnyrðingi og ælingur, partvís kavi, men eisini sólglottar. Hitin millum 2 og 6 stig.

# 2000 fólk sæð Kúlla Knút

**Hann er best, torir mest og nú hava 2.000 sæð leikin um Kúlla Knút og øll hini í Sjónleikarhúsinum í Havn**

TÍÐINDASKRIV ÚR SJÓNLEIKARHÚSINUM

Útvið 2.000 fólk hava hendan seinasta mánaðin sæð og hoyrt barna- og ungdómsleikin Kúlla Knút. Leikurin um tann lívliga Knút og hini børnini í teirri tilgjørdu bygdini hevur verið ein succes í einum enda í annan. 20 sýningar fyri fullum húsi eru spældar higartil, og hetta er mestsum óhoyrt í tílíkum høpi.

Bæði leikarar og áskoðarar lata væl at. Nógv arbeiði er lagt í venjingarnar undan leikinum. Tískil hevur tað nógv at siga fyri leikarарnar eins og framleiðsluliðið, at fólk hava verið so røsk at vitja.

Leikurin hevur í longri tíð verið útseldur fleiri dagar fram, og fólk mugu leggja sær dagin væl til rættis, um tey eisini skulu fáa vit, hvat tað er, sum er so spennandi í Sjónleikarhúsinum í hesum døgum.

Undir upprunanavninum Bølle-Bob vakti sjónleikurin – og kanska serliga tónleikurin – miklan ans í Danmørk. Samlaða sølan av fløgum og bondum er um 350.000. Kendi danski rithøvundurin innan undirhald Gunnar Geertsen hevur skrivað leikrit og tónleik. Tað var Elin á Rógvi, sum tók stig til at fáa leikin pallsettan í Sjónleikarhúsinum. Saman við Allani Dalsgarð hevur hon eisini umsett sangirnar og leikritið.

Leikurin er fluttur inn í eina tilgjørda føroyska bygd. Í hesari bygd finna vit øll børnini, handilsmannin Blom, hin fitta Una, frú Skund og sjálvandi eisini Kúlla Knút umframt øll hini í bygdini, sum gera hesa bygdina til nakað heilt serligt.

Leikurin er fyri tað nógva tónleikurin. Talan er um léttan tónleik, sum fellir lætt fyri oyruni. Við góðum dialogi er leikurin eisini ein rættur familjuleikur, har øll kunnu fáa nakað burturúr.

Leikurin er higartil settur á skránni tvær tær næstu vikurnar. Hevur tú ikki sæð leikin enn, so mást tú skunda tær.

Atgongumerkini kosta 80 kr. og kunnu keypast í Kunningarstovuni og í Sjónleikarhúsinum.



*Sjónleikurin um Kúlla Knút hevur higartil savnað 2.000 fólk í Sjónleikarhúsinum*
*Mynd: Finnur Justinussen*

### Hitalagið kring knøttin

| | |
|---|---|
| Illulisat | ÷3 |
| Nuuk | ÷5 |
| Qaqortoq | ÷4 |
| Ammassalik | 2 |
| Saint John's | 0 |
| Halifax | 3 |
| Reykjavík | 4 |
| Seyðisfjørður | 6 |
| Tórshavn | 8 |
| Lerwick | 9 |
| Aberdeen | 11 |
| London | 13 |
| Tromsø | 3 |
| Bergen | 9 |
| Oslo | – |
| Stokkhólm | 3 |
| Keypmannah. | 2 |
| Helsinki | 4 |
| Moskva | 1 |
| Berlin | 0 |
| Warzawa | 1 |
| Kiev | 0 |
| Bukarest | 0 |
| Paris | 8 |
| Madrid | 17 |
| Róm | 15 |
| Malorca | 18 |
| Athen | 21 |
| Malta | 12 |
| Tunis | 14 |
| Beijing | 10 |
| New Dehli | 27 |
| Bangkok | 31 |
| Jakarta | 33 |
| Sydney | – |
| New York | 8 |
| Miami | 30 |
| Los Angeles | 15 |
| Meksikobýur | 11 |
| Panama | 28 |
| La Paz | 15 |
| Rio de Janeiro | – |
| Buenos Aires | 22 |

### LUFTTRÝSTIÐ




Eitt lágtrýst, 986 hPa millum Íslands og Føroya fer í landsynning. Eitt annað lágtrýst, 982 hPa sunnan fyri Hvarvið fer spakuliga norðureftir.




Lágtrýstið yvir Norðsjónum grynnist og lágtrýstið vestan fyri Skotland fer eystureftir og dregur kalda høgættaluft móti Føroyum.

### HITALAGIÐ




Hitalagið mált frá 06/11 kl. 06⁰⁰– 07/11 kl. 06⁰⁰. Hitin í gjár: 7,2°
Minsti hiti máldur í nov.: ÷7,2° Mesti hiti máldur í nov.: 12,2°

### AVFALLIÐ




Avfallið: 5,0 mm – mált frá 06/10 kl. 06⁰⁰– 07/11 kl. 06⁰⁰
Avfallið higartil í november: 62,6 mm


TURRIKLÆÐI
HÚGVUR
T-SHIRT
KEPPAR
og FLØGG



12. MAÐUR
www.footballsupporters.fo


### VESTFALLSKYRRINDI

4. nov.: Tendring/Mánin næstur jørðini
11. nov.: Fyrra kvarter

Kelda. Álmanakkin 2002

| Dagur | Suðuroyar-/Vágafirði fp. | sp. | Skúvoyar-/Skopunarfirði fp. | sp. | Hestfirði/Sundalagnum fp. | sp. | Vestmannasundi fp. | sp. | Mykinesfirði fp. | sp. | Nólsoyarfirði fp. | sp. | 2 fj. í LS úr Mjóvanesi fp. | sp. | Leirvíksfirði/Haraldssundi fp. | sp. | Kalsoyar-/Svínoyarfirði fp. | sp. | Hvannasundi fp. | sp. | Fugloyarfirði fp. | sp. |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| 8. nov | 09.12 | 21.41 | 08.12 | 20.41 | 08.27 | 20.56 | 11.12 | 23.41 | — | 12.12 | 07.27 | 19.56 | 06.27 | 18.56 | 09.27 | 21.56 | 10.27 | 22.56 | 08.57 | 21.26 | 10.12 | 22.41 |
| 9. nov | 10.09 | 22.37 | 09.09 | 21.37 | 09.24 | 21.52 | — | 12.09 | 00.41 | 13.09 | 08.24 | 20.52 | 07.24 | 19.52 | 10.24 | 22.52 | 11.24 | 23.52 | 09.54 | 22.22 | 11.09 | 23.37 |
| 10. nov | 11.03 | 23.30 | 10.03 | 22.30 | 10.18 | 22.45 | 00.37 | 13.03 | 01.37 | 14.03 | 09.18 | 21.45 | 08.18 | 20.45 | 11.18 | 23.45 | — | 12.18 | 10.48 | 23.15 | — | 12.03 |
| 11. nov | — | 12.08 | 11.08 | 23.47 | 11.23 | — | 01.30 | 14.08 | 02.30 | 15.08 | 10.23 | 23.02 | 09.23 | 22.02 | — | 12.23 | 00.45 | 13.23 | 11.53 | — | 00.30 | 13.08 |

5 707265 100050 >